## Maradona hóttir við at rýma

Hóast tað skuldi eydnast Argentina at spælt seg til HM-endaspælið í fótbólti, hóttir landsliðsvenjarin, Diego Maradona, við at rýma úr starvinum. – Skal eg halda fram, verður tað eftir mínum treytum. Tá undankappingin er av, ætli eg mær at tosa við fótbóltssambandið. Tingini eru als ikki farin fram, soleiðis sum mær varð lovað, og tað ætli eg mær at tosa við teir um, sigur Diego Maradona við argentinskar miðlar.



## Carlos vil aftur til Madrid

36 ára gamli Roberto Carlos, sum í fleiri ár hugtók fótbóltsheimin við knallhørðu fríspørkum sínum og offensivum raidum frá bakkinum, vil nú aftur sleppa at spæla fyri Real Madrid. Somikið gjarna vil hann aftur til felagið, at hann hevur boðað frá, at hann er til reiðar at spæla, uttan at fáa nakra løn afturfyri. Roberto Carlos hevur seinnu árini spælt í turkiska Fenerbache, men nú vil hann sleppa at enda yrkisleiðina saman við heimsstjørnunum í Real Madrid.

# Fyrsta leikbannið í seks ár

**Símun Samuelsen hevur verið partur av landsliðnum síðani 2003, men hetta er fyrsta ferðin, at hann er leikbannaður ein dyst. Tað er ein undarlig kensla, sigur hann**




Rólant Waag Dam



– Tað er altíð keðiligt við leikbannum, men at vera leikbannaður ein útidyst í Frankaríki er eyka keðiligt, sigur Símun Samuelsen

Mynd: Rólant Waag Dam

**Tréguier, Frankaríki:** Mikudagin kom Símun Samuelsen til Frankaríki. Her vandi hann mikukvøldið, hósdagin og tvær ferðir fríggjadagin. Men hann sleppur at venja nakrar ferðir aftrat, áðrenn hann yvirhøvur kemur upp á tal til dystin í móti Rumenia.

– Tað skulu bara tvey gul kort til, so hetta er keðiligt, ger leikbannaði Símun Samuelsen greitt.

### Løgin kensla

Eitt leikbann í landsliðshøpi er nevniliga púra óvanligt fyri hann. Fyrsta dystin Símun Samuelsen spældi var í 2003. Seks ár seinni rendi hann seg í sítt fyrsta landsliðsleikbann. Tað kennist undarligt, ásannar hann.

– Hetta er løgið. Kappingin er jú liðugt og eg havi koblað eitt sindur av. So verði eg úttikin til landsliðið og komi her til, men kann framvegis ikki sleppa upp í part, fortelur Símun Samuelsen.

Tískil skýrir hann sín leiklut nú, í stóran mun at vera eitt slag av stuðulsleikara, ið skala syrgja fyri, at hinir geva alt, teir hava.

– Tað geri eg sjálvandi eisini, hóast eg ikki komi upp á tal til dystin leygardagin. Tí, um tú ikki kanst vísa nú, at tú ert klárur at spæla í morgin, so ert tú heldur ikki klárur at spæla mikukvøldið, sigur Símun Samuelsen, sum annars heldur, at ein dystur í móti Fraklandi á útivølli er nakað serstakt.

### Serligur dystur

– Tað er altíð keðiligt við leikbannum, men at vera leikbannaður ein útidyst í Frankaríki er eyka keðiligt. Stemningurin og alt rundan um dystin er nakað heilt serligt, og tað eru teir 18 mans, ið sleppa at uppliva. Tíverri eri eg ikki ein av teimum, sigur Símun Sameulsen, sum tískil fer at rópa á sínar liðfelagar frá síðulinjuni.

– Alt annað hevði verið hol í høvdið, sigur hann avgjørdur!

Spurdur, um hann eisini ferð at rópa á sín kappingarneyta í vinstra borði, ella um hann vónar, at hesin fer at dumma seg, svarar Símun Samuelsen flennandi, at hann vónar at hann fær karantenu.

– Har kemur so ein nýggjur maður inn. Spælir hann væl, má eg bara syrgja fyri at vera enn betri undir venjing, sigur Símun Samuelsen.

# Trygvi rópar leygarkvøldið

**Nýggi hjálparvenjarin, Trygvi Mortensen, rópar nógv undir venjing og soleiðis verður eisini leygarkvøldið, sigur hann**




Rólant Waag Dam

**Tréguier, Frankaríki:** Mikukvøldið var venjingin løtt og stutt. Tá hoyrdist heldur ikki nógv til hansara, men undir hósdagsvenjingini fingu leikararnir veruliga at hoyra, hvussu og hvør Trygvi Mortensen er.

– Tað skal vera power á og menn skulu vita, hvussu tingini skulu gerast, sigur nýggi hjálparvenjarin hjá Brian Kerr.

Men hóast hann er maðurin, ið rópar harðast og kanska tosar mest á vøllinum, so er tað Brian Kerr, sum setir dagsskránna.

– Vit koma sjálvandi við okkara metingum og geva okkara meiningar til kennar, men tað er Brian Kerr, sum kemur við tí stóru rammuni, sigur Trygvi Mortensen.

Soleiðis verður tað eisini leygarkvøldið, tá dysturin verður brikslaður í gongd. Brian Kerr setir dagsskránna og hevur seinasta orðið. Harðastu rópini meðan dysturin er í gongd, fara tó helst at koma frá Trygva Mortensen.

– Eg plagi í hvussu so er at rópa har, eg eri, sigur hann.



Ein nýggjur maður í einum nýggjum leikluti

Mynd: Rólant Waag Dam